# Útgerð til basan av oljudálking

Altíð tilreiðar at hjálpa tá dálking er

## Spill Kit - Mobil BL-Kit 30

Mesti absorberingskapasitetur: 38 litur
Effektivur absorberingskapasitetur: 30 litur




Pakki við absorbentum til smærri dálkingar undir flutningi og í ídnaði. Pakkin kann lættliga goymst aftanfyri setrið í flutningsakfari. Ein fyri brúkaran løtt, praktisk og effektiv loysn ímóti smáum oljulekum.

| Produkt | Støddir | Nøgd |
|---|---|---|
| ECOSORB púta | 30 x 50 cm | 2 |
| ECOSORB hosa 120 | 8 x 120 cm | 1 |
| ECOSORB hosa 240 | 8 x 240 cm | 1 |
| ECOSORB mátta7ark 2 | 40 x 50 x 200 gsm | 10 |
| Eingangshandskar | | 3 |
| Ruskposar v/lukking | | 3 |

## Onnur útgerð




Máttur, Kjølsvín, pútur, flótiverjur, plastposar, klútar, rullur....

OSR FAROES

826 Trongisvágur · tlf. 372 372 · fax 372 373 · pecon@post.olivant.fo

- tín umhvørvisloysn



## WELCOME TO TVØROYRI



Tvøroyri has also other capabileties to offer, with high quality and service. Just to name a few:

Boatbuilders
Concrete
Bookkeeping
Electronics
Entrepreneurs
Fish factories
Divers
Transport
Production
Hotel and Lodging
Advertising
Drivingschools
Bricklayers
Painters
Plumping
Radiomechanics
Consulting
Renovation
Trucks
Ship equipment
Blacksmiths
Shoemakers
Carpenters
Woodworkers

Tvøroyri is a growing city, with many existing and expanding capabileties. Summer 2003 was the start of a new harbour constuction, with it's main purpose to harbour the new ferry, whitch is to arrive in the end of 2004. The existing total of available industrial estate is aprox. 75.000 m2. Harbour area is aprox. 50.000 m2.

TVØROYRAR KOMMUNA

THE MUNICIPALITY OF TVØROYRI
FO-800 Tvøroyri
Faroe Islands
Tel. +298 371 085 - Fax. 371 814
Homepage: www.tvoroyri.fo
e-mail: tvoroyri@tvoroyri.fo




# 'Meira líkt fiskivinnnu enn vit hildu'

**Á Skipafelagnum Føroyar staðfestir stjórin at líkheitirnar millum oljuvinnuna og fiskivinnuna eru størri enn mett hevur verið tá tað snýr seg um ójavnar í arbeiðsbyrðu frá tíð til tíð**

LOGISTIKKUR

*Búi Tyril / PRnewsMedia.com*

Hetta við at eitt tíðarskeið er mestsum ov nógv at gera meðan eitt annað tíðarskeið er lítið og einki av arbeiði, er nakað føroyingar sum veiðimenn eru vanir við gjøgnum langar tíðir. Sama mynstur vísir seg sambært Skipafelagnum Føroyar óvæntað nógv í oljuvinnuni.

Sum samstarvari og høvuðs tænastuveitari hjá Atlantic Supply Base hevur Skipafelagið Føroyar hesi seinastu tvey-trý árini havt eitt gott høvi til at seg í oljuvinnuni.

"Eg má siga at hetta hevur verið meir líkt fiskivinnu enn vit hildu," viðmerkti Árni Joensen, tá vit spurdu um hvussu samstarvið millum Skipafelagið og ASB hevur gingið.

Annars læt hann væl at og vísti á at alt hevur gingið sum eftir ánni.

"Arbeiðið hevur gingið ógvuliga væl og eingir trupulleikar hava verið. Alt hevur víst seg at fungera."

Men nú er eingin stjóri á Atlantic Supply Base. Er tað ikki órógvandi?

"Vit kunnu ikki úttala okkum vegna ASB, men eg dugi ikki at síggja tann stóra dramatikkin her. Eg kann bara siga vegna Skipafelagið, frá okkara síðu sum partur í hesum konsortium, at her er talan um eitt ógvuliga ójavnt arbeiði. Tað er altso stór rokan í eina tíð og so dvali… Men hetta er jú tað nógvir føroyingar eru vanir við, og fyri okkum hetta í øllum førum ikki nakað kultursjokk."

"Vit kenna jú til bæði uppgangstíðir og niðurgangstíðir. Her er heldur ikki talan um serliga stórar íløgur… Tað er sjálvandi irriterandi at virksemið ikki er so nógv beint nú, men tað er nú einaferð bara so, hetta er jú veruleikin…"



*Árni Joensen, stjóri á Skipafelagnum Føroyar*

### Summarferiustørv

Stjórin á Skipafelagnum Føroyar vísti víðari á at Skipafelagið er vant við at avgreiða 3000 tons um vikuna, meðan arbeiðið í sambandi við oljuboringarnar vanliga hevur snúð seg um nøkur hundrað tons um vikuna.

Parturin hjá Skipafelagnum er at lasta og lossa, veita goymslu og avgreiða skipini, umframt nakað av øðrum, millum annað flutningstænastur.

"Proportiónirnar skulu nú ikki heilt koyrast út av lagi," helt Árni Joensen. "Tá virksemi er á basanum tosa vit um eitt skip eina ferð um vikuna – tað skal sjálvandi ikki undirmetast men relativt er tað ikki so nógv tá tú hugsar um at Skipafelagið framman undan klárar tvey skip hvønn dag, umframt at vit avgreiða 500 fremmand skip um árið. Tað stutta av tí langa er at vit hava eina skipan sum klárar toppbelastningar og botn. Hvat ASB viðvíkur, so er basin ikki deyður, hann liggur heldur í dvala – og eg dugi ikki at síggja nakað løgið í tí beint nú. Fólk kunnu jú ikki ganga fyri løn og trilla tumlar, tað sigur seg sjálvt. Hetta fólkið er ikki 'átta til fimm' fólk, okkara fólk eru von við at arbeiða í tørnum."

Árni Joensen minti á at sáttmálin við oljufeløgini um útgerðarhavn umfatar bæði Skipafelagið Føroyar og Atlantic Supply Base.

"Oljusáttmálin er við Skipafelagið og ASB, tað er eitt konsortium við hesum báðum sjálvstøðugu feløgum sum hevur kontraktina."

Annars vóru serfrøðingar úr Noreg við til at starta ASB upp; teir eru nú farnir. Teir vóru sum skilst útlæntir frá einum norskum felag.

"Vit leigaðu millum annað ein krana við kranaførar og ein annan norðmann eisini… Teir koma aftur tá tørvur er. Tað er ikki meira enn tað."

"Vit eru so til reiðar og hava fólk og kunnu seta í gongd at arbeiða so skjótt tað skal vera. Vit rokna við næsta tørni í 2005 og vónandi verður nógv at gera – nógv summarferiustørv."

# Fleiri cruise linarar enn nakrantíð

**Cruise ferðamannaskipini verða metnógv 42 í tali komandi summar**

ÚTLENDSK VITJANDI

*Búi Tyril / PRnewsMedia.com*

Talið á fráboðaðum útlendskum cruise ferðamannaskipum ið ætla sær á Havnina summarið 2004 er nú komið upp á 42, upplýsir Tórshavnar Havn. Hetta er nýtt met og kann vera eitt úrslit av drúgvum altjóða marknaðar arbeiði



sum Tórshavnar Havn hevur gjørt saman við pørtum av sjó-, flutnings- og ferðavinnuni í samstarvi við grønlendingar og íslendingar.

"Talið er hækkað í seinastuni," viðmerkti Agnar Joensen á Havnarskrivstovuni. "Tað plagdi í nógv ár at liggja um góð 20 útlendsk ferðamannaskip; í fjør kom talið tó upp á 34, og í ár komu 36 skip… Til næsta summar hava nú 42 teknað seg og fleiri skip klára vit neyvan."

Cruise skipini føra ofta týsk og onnur europeisk ferðandi, men amerikanarar eru væl við eisini. Skipini fylla vanliga millum 2 000 og 30 000 nettotons og gjalda havnapening í mun til tað. Tað størsta í fjør var "Rotterdam" við einari netto tonnagu upp á góð 30 000.

Sambært Agnar Joensen eru tey størstu skipini yvirhøvur sum hava vitjað á Havnini, tey 280 metrar longu systirskipini "Vison of the Seas" og "Enchantment of the Seas".

Ferðamannaskipini koma gjarna um morgunin og fara avstað aftur seinnapart; tey plaga at liggja í 5-12 tímar. Tórshavnar Havn fær í hesum høpi nakað av inntøku fyrst og fremst av havnaavgjaldi sum í sambandi við hetta virksemi plagar at liggja ímillum umleið 5 000 og 100 000 krónur.

Hvussu nógv hesar vitjanir annars generera í inntøkum er upp til vinnulívið; nakað dryppar so á busstúrar umframt arbeiði til avvarðandi skipaumboð og viðhvørt eitt sindur afturat.

Men kanska eru møguleikarnir størri enn so.

"Vit høvdu kunnað fingið væl meira burturúr, um vit bara vóru eitt sindur framligari," helt ein vinnulívsmaður.

# Herd trygdarkrøv til skip og havnir

**Amerikanarar herða síni krøv í krígnum móti yvirgangi – so skip og havnir mugu innføra nýggja verndarskipan**

TRYGD Á SJÓNUM

*Búi Tyril / PRnewsMedia.com*

Sum enn ein táttur í stríðnum móti altjóða yvirgangi og sjórænara virksemi, hava amerikanarar nú fingið altjóða sjóvinnu fe-lagsskapin hjá Sameindu Tjóðum, IMO (International Maritime Organisation), at seta í gildi verndarskipana ISPS (International Ship Port-facility Security-code). Tað upplýsir Føroya Sjómansskúli sum samstundis er farin undir skeiðvirksemi í sambandi við tey nýggju krøvini.

Aðrar skipanir eru samstundis settar í gildi av altjóða sjóvinnu felagsskapinum, millum annað AIS (Automatic Indentification System), ein radio fráboðanar skipan móti yvirgangi, ið skal vera umborð á øllum farmaskipum og ferðamannaskipum yvir 300 bruttotons í altjóða sigling.



"ISPS kodan fær gildi frá 1. juli 2004," vísir Føroya Sjómansskúli á í einum brævi til sjóvinnuna. "Tó soleiðis at skipanin skal longu vera innførd á farma-/ferðamannaskipum og havnaøkjum innan 1. apríl 2004. Kodan… er vorðin ein integreraður partur av SOLAS konventiónini (Safety Of Life At Sea – galdandi fyri øll farma- og ferðamannaskip yvir 500 bruttotons í altjóða sigling)…"

Sum skilst arbeiða í løtuni Fiskimálaráðið via Skipaeftirlitið vegna skip og reiðarí, saman við Vinnumálaráðnum herundir Landsverkfrøðinginum vegna havnamyndugleikarnar, við at orða neyðugar kunngerðir í samanhanginum.

"Tað sum hvørt skip /reiðarí, og hvør havn skal gera, er ein váðameting, ein verndarætlan, umframt at upplæra og útbúgva fólk í skipanin," skrivar Sjúrður Guðjónsson, skeiðsleiðari, vegna skeiðsdeildina hjá Føroya Sjómansskúla.